UTTAN ÚR HEIMI



*Her hava ísraelsmenn noytt nakrar fangar úr fongslinum í Jeriko. Fangarnir hava latið seg úr fyri at vísa, at teir hava ikki spreingievni uppi á sær*

*Mynd: Reuters*

# Hamas lovar hevnd

**Hamas hevur svorið at hevna ísraelska álopið á fongslið í Jeriko, og PFLP hóttir við at avrætta tríggjar útlendskar gíslar**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ísraelski herurin tók í gjár formannin í palestinska felagsskapinum PFLP, Ahmed Saadat. Hann og nakrir av viðhaldsmonnum hansara sótu í einum fongsli í Jeriko á Vestara Áarbakka, men ísraelsmenn kravdu at fáa fatur á honum.

Við hjálp frá stríðsvognum og tyrlum kringsettu hermenninir fongslið og kravdu, at Ahmed Saadat skuldi koma út. Men tá hann sýtti fyri at gera eftir boðunum, gjørdu ísraelsmenninir av at bróta fongslið niður, samstundis sum ein tyrla skeyt eina rakett inn í fongslið. Minst 40 fangar gjørdu av at fara úr fongslinum, men ikki Ahmed Saadat. Í telefonsamrøðu við sjónvarpið Al Jazeera segði hann, at hann og hansara menn fóru ongantíð at geva seg yvir.

Í gjárkvøldið valdi hann kortini at geva seg yvir, men ísraelsku myndugleikarnir hava greitt fingið– at vita, at nema teir eitt hár á høvdi hansara, fer PFLP at svara aftur.

– Gera teir seg inn á Saadat ella nakran av monnum hansara, fer jørðin at skelva undir zionistunum, segði talsmaðurin hjá PFLP við sjónvarpið Al Arabiya í gjárkvøldið.

Ísraelska álopið á fongslið í Jeriko er tað størsta ísraelska hernaðarátakið í teimum palestinsku økjunum í fleiri mánaðir, og Hamas hevur longu svorið at hevna álopið. Hamas-leiðarin Khelad Meshaal, sum heldur til í Damaskus, hevur sagt, at álopið á Jeriko verður hevnt.

PFLP og Hamas finnast samstundis at amerikanarum og bretum. Amerikanskir og bretskir eftirlitsmenn hava havt eftirlit við fongslinum í Jeriko, men fáar tímar undan ísraelska álopinum fóru teir haðani. Bretski uttanríkisráðharrin, Jack Straw, sigur, at eftirlitsmenninir kendu seg ikki nóg tryggar, men PFLP og Hamas vilja vera við, at eftirlitsmenninir fóru úr fongslinum, so ísraelsmenn kundu søkja at tí.

### Tóku gíslar

Í morgun kunngjørdu viðhaldsmenn hjá PFLP, at teir høvdu tikið tríggjar útlendskar gíslar, eina franska kvinnu, ein mann úr Iran og ein suðurkoreanskan sjónvarpsmann.

Í einari kunngerð, sum gíslarænararnir kunngjørdu, stóð, at teir tríggir gíslarnir verða tiknir av døgum innan 24 tímar, um lond teirra ikki leggja trýst á Ísrael fyri at fáa landið at lata Ahmed Saadat leysan beinanvegin.

# Fekk heilivág og brennivín inn í klivan

**Slobodan Milosevic fekk javnan annan heilivág, enn læknarnir høvdu givið honum**

MILOSEVIC
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Líkskoðanin av Slobodan Milosevic vísti, at hann doyði av einum hjartatilburði, men samstundis avdúkaðu blóðkanningar, at hann hevði tikið annan heilivág enn tann, sum læknarnir høvdu sagt, at hann skuldi fáa.

Men tað kemur ikki óvart á øll. Keldur í dómstólinum í Haag siga við tíðindastovuna AP, at fongslið hevði fyrr kunnað dómstólin um, at tað kundi veita trygd fyri heilsuni hjá Milosevic, tí hann fekk javnan annan heilivág og brennivín inn í klivan. Keldurnar, sum ikki vilja leggja navn til, siga, at hóast hesar upplýsingarnar frá fongslinum gjørdi dómstólurin einki fyri at steðga tí.

Sonur Milosevic, Marko, endurtók í gjár, at pápin fekk ikki ein náttúrligan deyða, men at hann bleiv myrdur.

## Buddha horvin

– Løgreglan og herurin í Nepal leita eftir tí 15 ára gamla Ram Bahadur Banjan, sum hvarv leygardagin eftir at hava hildið til í einum træi síðani tann 17. mai í fjør. Drongurin verður sagdur at hava serligar gávur, og nógv fólk í Nepal halda, at hann er ein endurføðing av sjálvum Buddha.

Buddhistiskir munkar og hinduprestar í Nepal kunngjørdu í gjár, at teir hava gjørt av at brúka tríggjar dagar at biðja fyri tí unga dronginum. Myndugleikarnir hava sett bæði løgregluna og herin at leita eftir honum, men ein embætismaður segði í gjár, at leitingin hevur verið úrslitaleys.

Síðani Ram Bahadur Banjan setti seg í træið fyri tíggju mánaðum síðani, hava fleiri túsund fólk verið í frumskóginum og vitjað hann. Men tá fólk komu hagar leygardagin, var hann horvin, skrivar AP úr Katmandu.

## Krevja nýval í Fraklandi

– Í Fraklandi hava studentarnir boðað frá stórum mótmælisgongum í morgin, og leygardagin fara fakfeløgini at gera tað sama fyri at mótmæla einari nýggjari lóg um arbeiðsviðurskiftini hjá teimum, sum koma á arbeiðsmarknaðin fyri fyrstu ferð.

Politiska andstøðan vil heldur ikki vita av lógini og krevur nú, at Jaques Chirac, forseti, skal senda tjóðartingið til hús og skriva út nýval. Fyrrverandi sosialistiski mentamálaráðharrin Jack lang segði í gjár, at Chirac eigur at gera sum Gerhard Schröder.

– Tá hann sá, at veljararnir høvdu vent stjórnini bakið, vildi hann hava tingið upploystog nývalg. Tað sama eigur forsetin at gera, segði Jack Lang.

Men stjórnin í París ætlar sær ikki frá við góðum. Dominique de Villepin, forsætisráðharri, hevur gjørt púra greitt, at stjórnin letur seg ikki ávirka av mótmælunum hjá studentunum og fakfeløgunum, og at hann ætlar sær ikki at bakka ein tumma.

## Løgreglumenn doyggja fyrr

– Ein kanning hjá norska løgreglufelagnum vísir, at í meðal doyggja løgreglumenn 6,7 ár fyrr enn menn í øðrum størvum.

Tey, sum hava gjørt kanningina, halda, at skiftandi arbeiðstíð er ein orsøk, tí tað økir vandan fyri varandi sjúkum so sum sukursjúku, krabbameini, hjartasjúkum, ovurfiti og strongd. Harafturat elvir skiftandi arbeiðstíð til sálarligar trupulleikar og vantandi samband við onnur fólk.

Formaðurin í løgreglufelagnum í Rogalandi, Arild Sandstøl, sigur við tíðindastovuna ANB, at arbeiðsviðurskiftini hjá løgregluni eru versnað tey seinnu árini. Eitt nú eru umleið 30 prosent færri løgreglumenn á vakt um vikuskiftið nú enn fyrr, og náttarvaktirnar eru serliga strævnar. Arild Sandstøl sigur, at tað einasta, sum kann loysa trupulleikarnar er, at løgreglan fær meiri fólk.

## Ein film afturat um Elizabeth

– Sjónleikakvinnan Cate Blanchett fekk sera góð ummæli fyri høvuðsleiklutin í filminum um Elizabeth I, og nú hevur hon so játtað at spæla sama leiklut í einum framhaldsfilmi um ta kendu ensku drotningina.

Tann fyrri filmurin snúði seg um tíðina, tá Elizabeth kom til valdið, og um viðurskiftini ímillum hana og Mariu Stuart. Í tí seinna filminum verður sagt frá tí sokallaða gylta tíðarskeiðinum hjá Onglandi við Elizabeth við róðrið, men væntandi verður eisini nomið við onnur viðurskifti. Eitt nú fer filmurin at lýsa viðurskiftini ímillum drotningina og Sir Walter Raleigh, sum sambært summum søgumonnum var í songini hjá drotningini av og á.

Nýggi filmurin hevur fingið heitið ”Elizabeth: The Golden Age”, og upptøkurnar byrja í næsta mánað. Fleiri av leikarunum í tí fyrra filminum spæla eisini í tí nýggja.